# Fýra danir deyðir av salmonella

Teir seinastu mánaðirnar eru nógvir danir smittaðir av salmonella, og fýra eldri fólk eru deyð av smittuni. Hesar mánaðirnar hava 79 fólk verið hjá lækna eftir at hava etið kjøt við salmonellabakterium, og fýra teirra doyðu. Tað skrivar B.T. í dag. Tey fýra, sum doyðu, vóru eldri enn 75 og búðu á Sælandi. Statens Serum Institut sigur fyri blaðnum, at talan er um salmonellabakteriurnar U288 og U312. Sagt verður, at smittan er komin frá svínakjøti frá sláturhúsum í Jyllandi og Sælandi. Enn vilja myndugleikarnir ikki siga, hvørjum sláturhúsum smitan kom frá, ella hvørjum matvørum fólk skulu ansa eftir, skrivar B.T.



# Ingibjörg hugsar seg um

Formaðurin í íslendska flokkinum Samfylkingin, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, fer seinni í vikuni at boða frá, hvussu verður við hennara politiska lívi í framtíðini. Ingibjörg Sólrún hevur havt farloyvi frá Altinginum tær seinastu vikurnar vegna sjúku, og hesa tíðina hava íslendsku fjølmiðlarnir kjakast dúgliga um, hvørt hon man ætla at halda fram í politikki ella ikki. Blaðið Vísir skrivaði í gjár, at Ingibjörg Sólrún ráðførir seg við Jóhönnu Sigurðardóttur, forsætisráðharra, sum eisini er floksfelagi hennara. Samfylkingin skal hava landsfund í næsta mánað.




*Føroyingar eru blivnir nógv varnari at brúka pengar og tað merkir, at teir keypa verri enn so líka nógv nú av vanligum nýtsluvørum, sum teir gjørdu fyri nøkrum mánaðum síðani*

*Tilvildarlig mynd*

# Føroyingar hava sett seg tungt á pengarnar

**Føroyingar hava sett fótin á bremsuna og hava meldað seg úr brúkaraveitsluni. Sostatt eru inntøkurnar hjá landskassanum av mvg og øðrum avgjøldum rapaðar niðureftir**

LANDSKASSA-INNTØKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroyingar liggja nú nógv fastari á pengunum, enn teir gjørdu fyri nøkrum fáum mánaðum síðani.

Sostatt er keypihugurin eisini munandi minkaður seinastu tíðina og fólk eru fyri ein stóran part blivin nógv varnari at keypa til vanligt forbrúk.

Av tí sama eru inntøkurnar hjá landskassanum av mvg og øðrum avgjøldum, eisini munandi minkaðar seinastu tíðina.

### Minkað 27%

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, staðfesti í Løgtinginum í gjár, at í januar í ár er inntøkan hjá landskassanum av mvg og øðrum avgjøldum næstan 27% minni enn hon var í januar í fjør.

Í Januar í 2008 var inntøka landskassans av mvg og øðrum avgjøldum 150 milliónir krónur, men nýggjasta uppgerðin í fíggjarmálaráðnum vísir, at í januar í ár var inntøkan fallin heilt niður á 110 milliónir.

Sostatt er talan um eina minking upp á 40 milliónir, ella sløk 27%.

Jóannes Eidesgaard sigur, at av hesi minkingini upp á 40 milliónir, stavar nógv tann størsti parturin frá vanligum forbrúki.

Mvg inntøkan hjá landskassanum av vanligum nýtsluvørum eru 30 milliónir lægri í januar í ár enn tær vóru í sama mánaði í fjør.

- Tað er tekin um, at forbrúkið onkusvegna er steðgað og at fólk ikki keypa so nógv longur, sigur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Annars er inntøkan av skrásetingargjøldum av bilum eisini munandi minkað í januar í ár aftur ímóti í januar í fjør.

### Skattainntøkan minkar ikki

Annars staðfesti Jóannes Eidesgaard, at inntøkurnar hjá landskassanum av skatti vóru hægri í januar í ár, enn tær vóru í fjør.

Inntøkan av vanligum skatti er bara minkað fýra milliónir januar í ár aftur ímóti í januar í fjør.

Men inntøkan av partafelagsskatti er vaksin enn meiri, so tilsamans er inntøkan hjá landskassanum av skatti hægri í januar í ár enn í januar í fjør.

- Veruleikin er, at hugsa vit um inntøkur landskassans av skatti, er januar í ár tann besti januar mánaði síðani 2006, staðfestir landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Tilsamans er inntøkan hjá landskassanum av skatti tilsamans góðar 105 milliónir í januar 2009 og tað er altso eitt vet hægri enn í januar í fjør.

Men her skal havast í huga, at tann ætlaði skattalættin, sum skuldi koma í gildi á nýggjárinum, er strikaður. Hevði hann ikki verðið tað, var inntøkan munandi lægri.

Tórbjørn Jacobsen, løgtingsmaður fyri Tjóðveldi, staðfestir, at hevði undanfarna ABC samgonga ikki latið illa umstríddu skattalættarnar, hevði inntøkan hjá landskassanum nú verið 400 milliónir meiri um árið, enn tær eru.

Men Jóannes Eidesgaard mátti so eisini ásanna, at páhaldið um, at tað er bara at lække skattin, so hække inntøkurnar hjá landskassanum, heldur ikki altíð.

# Ein almennur stovnur afturat fluttur til Suðuroyar

**Johan Dahl hevur flutt umsitingina av aliloyvum til Suðuroyar**

ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú er ein almennur stovnur afturat fluttur til Suðuroyar.

Tað hendir eftir at Johan Dahl nú um dagarnar gjørdi av at flyta umsitingina av liloyvum til Suðuroyar.

Í seinastuni hevur verið søkt eftir einum aliumsitara og tað starvið er akkurát nú sett.

Tað er Kristina Vilhelm í Vági, sum er sett í starvið. Hon er lívfrøðingur og hon byrjar í starvinum í næstu viku.

Kristina Vilhelm hevur royndir úr alivinnuni, har hon hevur arbeitt við at gera innanhýsir virkisætlanir og úr Danmark hevur hon eisini viðkomandi royndir, har hon hevur arbeitt við umhvørvisumsiting.

Talan er ikki um eitt fulltíðarstarv, men um eitt hálvtíðarstarv og helvtina av tíðini skal hon halda fram at arbeiða fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, har hon eisini arbeiðir nú, upplýsir Johan Dahl, landsstýrismaður.

Tá ið brúkaraumboðið er flutt til Suðuroyar, er ætlanin at umsitarin av aliloyvum skal flyta inn í sama hús.